# 330 fólk á eldradegi í Runavík

**Lansfelag Pensionistanna skipaði leygardagin í felag við eldrafelagnum NÓN fyri eldradegi í ítróttarhøllini í Runavík. Sera nógv fólk møttu, og tiltakið var sum heild sera væl eydnað**

ELDRADAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*






*330 luttakarar vóru á eldradegnum í Runavík leygardagin. Andrias Petersen var ein av røðarunum*

Eldradagurin er eitt afturvendandi tiltak, sum Landsfelag Pensionistanna skipar fyri í samráð við lokalu pensjonistafeløgunum. Eldradagurin hevur verið hildin ymsastaðni kring landið, og í ár varð hann hildin í Runavík.

## Gevur innihald

Eftir at Amy Djurhuus, forkvinna í NÓN, hevði bjóðað vælkomin, fekk Kári P. Højgaard, býráðslimur í Runavíkar kommunu og løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, orðið.

Hann heldur, at tað er ein ótrúliga góður møguleiki hjá teimum eldru at koma saman á einum eldradegi. Tað er møguleiki fyri at fáa nakað bæði til likams og til sálar. Slík tiltøk og onnur hjálpa til at geva lívinum innihald, eftir at vit eru farin av arbeiðsmarknaðinum.

Á eldradegnum hittast fólk frá øllum landinum, sum ikki hava sæð hvønn annan í fleiri ár. Tað skapar ein felagsskap millum tey eldru, segði Kári P. Højgaard.

Kári kom eisini inn á týdningin av rørslu. Hann hevur sjálvur gingið túr hvønn dag og sigur, at tað er sera gevandi. - Livitíðin verður longri, og livigóðskan verður betri, tá ið vit røra okkum.

Jógvan Fríðriksson hugleiddi um munin millum tey eldru og tey yngru. Sum altíð fangaði hansari livandi frásøguháttur áhoyrarafjøldina.

## Fimtingurin av gentunum í Føroyum verða 100 ár

Kór Glyvra Kirkju, sum Meinhard Bjartalíð stjórnar, sang, áðrenn Andrias Petersen, lækni og løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin, fekk orðið. Hann byrjaði við einum søguligum afturliti. Tað ættarliðið, sum eru pensjonistar í dag, vaks upp í krígsárunum. Tað var ein sera óstøðug tíð, har tað fyrst gekk sera væl, men síðani kom kreppan í 50´unum.

Børnini í dag liva undir støðugum viðurskiftum. Vit tosa ikki longur um sjúkur sum tuberklar og eingilska sjúku. Í dag eru vælferðarsjúkurnar fíggindin. Ovurnýtsla av tubakki, alkohol og mati er ein stórur trupulleiki hjá nógvum. Tað er týdningarmikið, at vit liva sunt, og at vit røra okkum. Ein gongutúrur um dagin er sera góður. Um vit eru ansin um, hvussu vit liva, kann okkara lívsgóðska hækka, og livialdurin økjast, segði Andrias Petersen.

Um núverandi gongd heldur fram, so kunnu vit vænta, at tað ikki verður óvanligt, at fólk gerast 100 ár. Tølini vísa, at fimta hvør genta, sum verður fødd í dag, fer at gerast 100 ár, segði Andrias Petersen.

## 330 pensjónistar gjørdu fimleik

Eftir døgurða var dentur lagdur á rørslu og fimleik. Fyrst segði ein fysioterapeutur frá týdninginum av, at tú rørir teg. Aftaná hevði Jóhanna Troest, fimleikalærari fimleik við allari fjøldini.

Alfred Olsen, løgtingslimur fyri sambandsflokkin tosaði um landspolitikk og eldraøkið.

Høvi var at seta spurningar, og eftir at lutaseðlarnir vórðu trektir, var dagurin komin at enda. Klokkan var vorðin 17, tá ið luttakarnir fóru hvør til sítt.

Amy Djurhuus, forkvinna í NÓN sigur, at hon er sera væl nøgd við dagin. - Hetta er størsta luttakartal nakrantíð, og eg haldi, at luttakarnir fingu nógv burturúr.

---

# Sera góð undirtøka

**Niklas Akraberg Poulsen er formaður í Landsfelag Pensjónista. Hann sigur, at tey hava fingið ótrúliga góða hjálp frá øllum síðum til at skipa fyri degnum.**

ELDRADAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Niklas Akraberg Poulsen, formaður í Landsfelag Pensjónista var sera vælnøgdur við dagin. - Hetta styrkir um samanhaldi, sigur hann*

Eldradagurin í ár var sera væl eydnaður. Tað hava ongantíð møtt so nógv fólk upp, sigur Niklas Akraberg Poulsen.

– Vit skipa fyri degnum í samstarvi við tey lokalu feløgini, og tað gongur upp á skift, hvar eldradagurin verður hildin. Í fjør var hann í Klaksvík, og í ár varð eldradagurin hildin í Runavík. Samstarvið við tey lokalu feløgini er sera gott. Vit møta vælvild frá øllum síðum. Kommunan letur okkum fáa ítróttarhøllina, og Sjómansheimið letur matin, sigur Niklas.

– Tað er týdningarmikð fyri tey eldru, at tað verður skipað fyri slíkum tiltøkum, tí at tað gevur fólki okkurt at fara út til. Tað kann onkuntíð vera lítið at fara til, tá ið tú verður eldri, og so er tað skjótt, at tú bara situr inni.

– Hetta styrkir um samanhaldið hjá pensjónistunum. Endamálið við hesum degnum er ikki, at vit skulu síggjast og fáa politiska ávirkan eins og fakfeløgini gera, men heldur at styrkja um samanhaldið millum pensjónistarnar.

– Tá ið vit tosa um rættindini hjá teimum eldru, er tað landsfelagið, sum umboðar okkum. Sjálvandi standa vit eisini sterkari, tá ið samanhaldið er gott, sigur Niklas.

Millum røðarnar á eldradegnum vóru Andrias Petersen, sum er lækni og Jógvan Fríðriksson, prestur.

– Vit royna altíð at hava skránna soleiðis, at fólk fáa okkurt burtur úr bæði til likams og sálar. Tí hava vit valt at hava ein prest og ein lækna, sigur Niklas Akraberg Poulsen.

# Sæð fólk aftur aftaná 20 ár




*Ella og Ingibjørg Petersen hugnaðu sær á eldradegnum. Tær hittu nógv fólk, sum tær ikki høvdu sæð í langa tíð.*

Klokkan tólv var døgurði at fáa. Tá var góður møguleiki at fáa eitt prát. Yvirav mær sótu tvær stuttligar og frískligar systrar úr Klaksvík. Tær eita Ella og Ingibjørg Petersen, og teimum dámar væl, at tað verður skipað fyri einum eldradegi.

– Undirsjóvartunnilin ger tað so lætt at ferðast, so at vit ivaðust ikki í at fara. Tað er stuttligt at kunna hitta so nógv fólk, sigur Ella Petersen

– Eg havi hitt onkran í dag, sum eg ikki havi sæð í 20 ár, sigur Ingibjørg Petersen.

Tá ið eg sigi teimum, at eg eri tíðindamaður hjá Sosialinum, flenna tær við tankan um, at tær skulu í blaðið.

- Eg hugsaði, at tú mátti vera tíðindamaður, tí at tú spyrt so nógv, sigur Ella.

**HK**